SKYN

# Ikki bert ognir, men heim



## ARGIR

Tvíhús, Áarrás 12b

160 324 2 1989

Tvíhúsini eru í tveimum hæddum. Í niðaru hæddini er durur, gongd, 3 kømur og fýrrúm. Í ovaru hæddini er gongd, baðirúm, kamar, køkur og stova í einum. Køkurin er HTH køkur frá 2008. Baðirúmið er gjørt av nýggjum í 2010. Húsini standa væl fyri í friðarligum umhvørvi og hava sera gott útsýni. Dagstovnur og skúli eru nærindis. Parkeringspláss er til tveir bilar.

Prísuppskot: kr. 2.050.000








## KLAKSVÍK

Sethús, undir Fossum 50



306 540 2 1979




Stór sethús við góðum útsýni. Í ovaru hæddini er durur, gongd, køkur, 2 stovur, baðirúm og 3 kømur. Í niðaru hæddini er kjallari/fýrrúm/vaskirúm, og møguleiki er at gera garasju. Vindeygu og klædningur vórðu skift í 2009, og takið er frá 2006. Húsini standa ovarlaga í býnum og hava sera gott útsýni.

Prísuppskot: kr. 1.500.000

## VESTMANNA

Sethús, Neslíð 17



224 789 2 2009




Nýggj sethús í tveimum hæddum ovarlaga í bygdini. Í ovaru hæddini er køkur, stova, baðirúm við brúsu, 2 kømur, baðirúm við baðikari, gongd, durur og hjallur. Í niðaru hæddini er stórt kjallararúm. Húsini standa væl fyri í nýggjum býlingi. Umhvørvið er friðarligt og veðurgott, og útsýnið er avbera gott. Stutt er til allar hentleikar.

Prísuppskot: kr. 1.500.000

SENDISTOVAN